# Næsta stig er ein kommuna í Vágum

**Borgarstjórin í Bíggjar Sóknar Kommunu heldur, at nú Sørvágs og Bíggjar Sóknar Kommunur verða lagdar saman, er natúrligt, at næsta stigið verður at arbeiða fyri eini samanlegging av øllum kommununum í Vágum**



*Tað var stórur áhugi fyri uppteljingini eftir fókaatkvøðuna, sum var í Gamla Skúla í Bø leygardagin*

*Mynd: Edvard Joensen*

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað natúrliga eigur at vera at arbeitt verður fyri eini stórari felags kommunu í Vágum, heldur borgarstjórin í Bíggjar Sóknar Kommunu, Jógvan Páll Joensen.

Við einum greiðum meiriluta søgdu borgararnir í Bíggjar Sóknar Kommunu leygardagin ja til at leggja kommununa saman við Sørvágs Kommunu.

Á vegleiðandi fókaatkvøðuni, sum varð hildin í Bø, har fólk úr Bø og Gásadali høvdu valrætt, vóru 89,6 prosent á vali. Av teimum atkvøddu 39, ella 65 prosent, fyri samanlegging, og 21, sum svara til 35 prosent av teimum, sum greiddu atkvøðu, vóru í móti samanleggin við Sørvágs Kommunu.

Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggja Sóknar Kommunu, fegnast um úrslitið. Hann sigur, at hóast einki ítøkiligt er undirskrivað enn, er alt, sum bendir á, at bygdarráðini bæði í Bø og Sørvági, fara at gera av at leggja kommunurnar saman á nýggjárinum.

Nýggja kommunan fer at eita Sørvágs Kommuna eftir firðinum, sum allar tríggjar bygdirnar í nýggju kommununi liggja við.

### Fyribils sáttmáli

Arbeitt hevur verið við at leggja kommunurnar saman, men endaliga avgerðin er ikki tikin enn. Millum annað hevur verið bíðað eftir, hvat borgararnir hildu um málið. Nú er tað so fingið greitt upp á pláss, sigur Jógvan Páll Joensen, so nú er bara at fara víðari.

Hann sær bara fyrimunir við at leggja saman og vísir á, at eitt nú tað praktiska, sum gerast skal í bygdunum, verður nógv lættari at avgreiða, um talan er um eina stóra kommunu.

– Bara slíkt sum at fáa grivið rennur ella lagt kaðal. Okkurt smávegis vegarbeiði og so framvegis, máttu vit biða fólk til. Tað slepst undan í eini stórari kommunu, sum frammanundan hevur fólk til slíkt, sigur hann.

Eisini dagliga umsitingin verður nógv lættari, tí Sørvágs Kommuna hevur skrivstovu, sum eisini fer at tka sær av málum, sum hava við Bø og Gásadal at gera, vísir Jógvan Páll Joensen á. Slíkar umstøður hevði Bíggjar Sóknar Kommuna ikki, sigur hann.

Hann heldur ikki, at fólki í Bø nýtist at óttast fyri, at eitt nú barnaansingin dettur niður ímillum, hóast lagt verður saman við Sørvági.

– Tað er nevnt í sáttmálanum, vit hava gjørt, at barnaansingin heldur fram í Bø. Og nú, kommunuskrivstovan flytir út av skúlaloftinum,verður tað so mikið rúmligari í Gamla Skúla, vísir hann á. Skúlabørnini ganga longu sum er í skúla í Sørvági, og tað riggar væl við flutningi ímillum.

At skattaprosentið í verandi fíggjarári er nakað hægri í Sørvági, enn tað er í Bø, heldur hann heldur ikki vera nakran stóran trupulleika, tí tekin eru til at tað fer at javna seg út, eftir sum skuldin hjá Sørvágs kommunu verður niðurgoldin.

### Ein eind

Jógvan Páll Joensen dylur ikki fyri, at hann kundi hugsað sær Vágar sum eina kommunu. Og tað eigur nú at vera næsta stigið, farið verður undir, heldur hann.

– Tíðin er farin frá øllum hesum smáu kommunalu eindunum, sigur hann. Skulu vit gera okkum nakrar tankar um at hava nakra ávirkan á politisku gongdina í landinum, eiga vit at taka við uppgávum, sum annars liggja sentralt. Og tað klárar ein lítil kommuna ikki.

– Vit stýra ongum politiskum málum. Tað einasta, vit í slíkum smáum kommunum gera, er at taka tekniskar avgerðir um byggiloyvi og rennugrevstur. Og tað er ov lítið. Vit mugu fáa ordiligan politikk inn í kommunala arbeiðið, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Sóknar Kommunu.

Verandi støða er eisini viðvirkandi til, at tað útbúna fókið fer aðrastaðni, har størri møguleikar og avbjóðingar eru at fáa, vísir hann á.

Jógvan Páll Joensen sigur, at hann er fyri at leggja størri uppgávur út til kommunurnar. So fáast fólk eisini at støðast. Fólk, sum kunnu átaka sær at røkja hesar uppgávurnar. Tað fer so aftur at skapa meira lív á økjunum, tí tað vísir seg ofta, at tað eru hesi fólkini við teimum góðu útbúgvingunum, sum hava tey góðu hugskotini, sigur hann.

## Nú skal tað praktiska avgreiðast



*Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvág Kommunu, var eisini staddur í valhølinum í Bø, tá úrslitið av fókaatkvøðuni varð kunngjørt leygarkvøldið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Nú skal tað umsitingarliga í samband við ætlaðu kommunusamanleggingina avgreiðast, sigur borgarstjórin í Sørvági**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Nú er tað praktiska eftir, áðrenn endaligur sáttmáli kann undirskrivast, segði borgarstjórin í Sørvági, Eivin Jacobsen, eftir fólkaatkvøðuna í Bíggjar Sóknar Kommunu leygardagin.

Hann væntar ongar trupulleikar av at fáa samtykt samanleggingina í báðum bygdarráðunum. Fyribils avtala er gjørd, og okkurt smávegis er, sum eftir er at avtala. Men ikki nakað, sum fer at kollrenna ta avtalu, sum fyriliggur, væntar Eivin Jacobsen.

Um samanleggin til eina stóra felags kommunu í Vágum sigur Eivin Jacobsen, at nakað ítøkiligt um tað fyriliggur ikki. Einki slíkt hevur verið viðgjørt í kommunalum samanhangi í Vágum, sigur hann.

Men persónliga er hann fúsur at fara undir at kanna teir fyrimunir og vansar, sum kunnu standast av tí.

Hann sigur, at tað er greitt, at Sørvágs Bygdarráð fer at viðgera eitt slíkt uppskot, um tað kemur. Men nú skulu bygdarráðslimir taka tað eitt sindur róligt enn eina løtu, heldur hann. Tí stutt er til kommunuval, sum verður í heyst, og klókast er helst at bíða til eftir tað valið, og so lata tey, sum tá skulu stýra, taka tær endaligu avgerðirnar, heldur borgarstjórin í Sørvági.



*Ein stór kommuna, har allar Vágar eru við, er tað einasta rætta, heldur borgarstórin í Bíggjar Sóknar Kommunu, sum eftirlýsir ordiligum politikki í kommunalum samanhangi*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Fleiri landingar á Beta hesa vikuna

**Hóast vártíð er, er meginparturin av upsanum, sum trolararnir fáa, smáur og hevur lítlan prís. - Tí liggja fleiri trolarar í bestu vártíð nú á hvítum fiski, sigur Ragnar Olsen**



*Línubáturin, Váðasteinur, landaði á Beta í síðstu viku, tá ið hendan myndin varð tikin. Hesa vikuna vænta tey á landingarmiðstøðini í minsta lagi 5 skip, harav Vesturland ætlandi landar í dag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará vænta tey, at í minsta lagi fimm skip koma inn at landa hesa vikuna. Tann fyrsti verður helst Vesturland, sum roynir við gørnum. Seinni í vikuni koma so eisini Stelkur og Bakur og Trastur og Skarvur.

Ragnar Olsen sigur, at tað er ikki óhugsandi, at onnur skip eisini verða landaði á Beta, sum vikan líður.

Í síðstu viku landaði Beta eisini nøkur skip, og millum hesi var Váðasteinur, sum er á hesi myndini.

### Smáur upsi

Ragnar sigur annars, at lítið er at fáa av stórum og góðum upsa, sum hevur ein hampiligan prís.

– Ein 50-75% av veiðini hjá skipunum er upsi 4, sum liggur rundan um tríggjar krónur fyri kilo.

Hann sigur, at einar 4-5 krónur fáast fyri kilo av upsa 1, men tað er so forsvinnandi lítið av hesum fiski uppí í veiðini.

– Eg veit ikki, um vit yvirhøvur kunnu tosa um prosentir av upsa 1, tá ið 50-75% av veiðini er upsi 4.

### Hvítur fiskur

Ragnar sigur, at nógvir trolarar royna eftir hvítum fiski, tí upsafiskiskapurin gevur so lítið.

Heldur ikki, nú vártíð er, og fiskurin gýtir, er nakar bati at tosa um í støddini á upsa.

– Skipini royna at fáa fatur á tí frægara upsanum, sum hevur betri prís, men sum skilst, er lítið av hesum fiskinum uppi í veiðini. Tí liggja fleiri trolarar og fiska hvítan fisk, nú vártíð er, sigur Ragnar Olsen.

# Tríggjar ungar gentur mundu endað á blámanum

**Ein togendi bjargaði bilinum úti á pierinum í Saltangará, tá ið førarin av óvart kom at traðka á speedaran heldur enn bremsuna. Bæði framhjólini fóru út av bryggjukantinum**



*Tað var her úti á pierinum, at ein bilur við trimum ungum gentum mundi farið í havið. Bæði framhjólini fóru út um bryggjukantin, men ein endi á sandbátinum, sum lá við bryggjuna, gjørdi, at bilurin ikki koppaði út av og fór í bláan sjógv*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánakvøldið í síðstu viku kundi enn ein álvarslig vanlukka verið hend á havnalagnum í Saltangará. Hendingin fór fram úti á pierinum, tá ið ein bilur við trimum ungum kvinnum mundi farið á sjógv millum tvey skip. Annað skipið var sandbáturin hjá Niclasi Højgaard.

### 18, 17 og 17

Førarin á bilinum, Maria í Grund, sum er 18 ára gomul, fekk koyrikortið fyrst í hesum árinum. Við síðuna av henni sat 17 ára gamla systirin, Marna. Aftanfyri í bilinum, sum bert hevur tvær hurðar, sat 17 ára gamla vinkona teirra, Jonna.

Allar búgva tær í Søldarfirði.

Hendingin fór fram, tá ið Maria av óvart kom at traðka á speedaran heldur enn bremsuna. Bæði framhjólini á bilinum fóru út um bryggjukantin, sum tískil hekk á »búkinum«. So heppið var tað, at annað hjólið kom at hvíla á endanum hjá sandbátinum, og pápi Mariu og Marnu, Sámal Petur í Grund, sigur, at soleiðis, sum hann hevur skilt álvarsligu støðuna, var endin avgerandi fyri, at bilurin ikki fór í havið.

Mamma Jonny, Sigrid Gaardbo, sigur, at dóttirin ringdi beint eftir hendingina og segði, hvat var hent.

– Seinni hava vit hugsað um, hvat kundi verið hent, og tað er ein óhugnaligur tanki, sigur hon.

### Álvarslig støða

Sigrid sigur, at genturnar vóru ræddar, men samstundis høvdu tær – ungdóminum so líkt – hug at smírast at, hvussu gekst at koma út úr bilinum, meðan hann enn hekk hálvur út av bryggjuni.

Hon sigur eftir dóttrini, at allar tríggjar genturnar noyddust at grulva úr bilinum.

Sosialurin hevur skilt, at støðan tóktist so álvarslig, at genturnar tordu illa at røra seg í bilinum, til hjálp var komin á staðið.

Ein maður var á bryggjuni, og skjótt komu fólk, sum vóru umborð á skipunum, eisini til hjálpar.

Tað eydnaðist í øllum góðum at fáa tær tríggjar genturnar út úr bilinum og uppá bryggjuna í tryggleikan.

Sámal Petur sigur, at Maria, sum siglir við Nærabergi, hevur koyrt stutt og bilurin, genturnar koyrdu í, hevur automatisk gear.

– Vit kunnu bara vera fegin um, at alt endaði væl, sigur pápin at teimum tveimum gentunum.

### Ein hending

Hendingin næst síðsta mánakvøld er eitt prógv um, hvat kann henda, tá ið illa vil til. Tíbetur hendi eingin vanlukka, men tað kundi verið so skjótt, tá ið bilurin var so nær við at koppa út at og í bláan sjógv.

Seinastu mánaðirnar eru fleiri bilar endaðir á sjónum, og fólk standa spyrjandi, hví slíkt hendir.

Í Havn eru tveir bilar farnir á sjógv. Í øðrum førinum doyði ein maður, og á oljubryggjuni í Saltangará fór ein bilur út av við faðiri og soni, har sonurin læt lív.

Hendingin, sum rakti tær tríggjar genturnar, Mariu, Marnu og Jonnu, var eitt hendiligt óhapp, sum tíbetur ikki førdi til eina álvarsliga vanlukku.

Men tað var um reppið.